

LØGTINGS- & FÓLKATINGSVAL 2026

# SAMBAND

## TRYGGLEIKI OG TRIVNAÐUR

Sambandsflokkurin

# EITT VAL UM TRYGGLEIKA OG TRIVNAÐ

Føroyar eru eitt av heimsins bestu og tryggastu londum at liva í. Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at tað eisini verður so í framtíðini.

Tó broytist heimurin rundan um okkum, og kríggj í Evropa, geopolitiskur spenningur og økt trýst í Ríkisfelagsskapinum seta hvønn dag heimsskipanina undir alsamt størri trýst. Saman við vitlíki, falstíðindum og net-álopum fer hetta at hava við sær stórar og ókendar broytingar á øllum samfelagsligum økjum.

Í slíkum ótryggum tíðum er tað tí av alstórum týdningi at halda eina trygga kós.



## MØTAST Á MIÐJUNI

Sambandsflokkurin arbeiðir fyri at skapa einar Føroyar, sum eru búskaparliga sterkar, sosialt tryggar, mentanarliga ríkar og opnar fyri samstarvi við umheimin.

Vit velja samanhald fram um sundurskiljing, skynsemi fram um symbolpolitikk og støðufesti fram um óvissu. Vit eru semjusøkjandi og arbeiða fyri teimum breiðu langtíðarloysnunum – bæði á løgtingi og á fólkatingi.

VEL SAMHALD
VEL SAMSTARV
**VEL SAMBAND**

# BÚSKAPIN Á BEINT

Risastórar avbjóðingar standa fyri framman. Tað er týdningarmikið at hava ein sterkan búskap við yvirskoti á fíggjarlógini í góðum tíðum.

Tí vilja vit varðveita ríkisveitingina, sum skal oyramerkjast til vælferð. Vit skulu raðfesta kjarnutænastur og skerja óneyðugar almennar útreiðslur. Hetta kann gerast við at útveita almennar uppgávur til fyrimuns fyri bæði borgara og vinnu.

Vinnan skal blóma og hava tryggar karmar, og tað skal loysa seg hjá øllum at arbeiða. Sambandsflokkurin vil eggja føroyskum íløgum og nýskapan, so at føroyska vinnan framhaldandi kann skapa virði og arbeiðspláss.

Samstundis vilja vit arbeiða fyri einari burðardyggjari framtíð við realistiskum átøkum innan grøna orku og umhvørvi.





# OKKARA MÁL

## BÚSKAPUR

- Avtaka mótrokningina hjá arbeiðandi pensjónistum
- Styrktan íverksetaragrunn og nýskapan í vinnuni
- Brúka donsku tvískattaavtalurnar til at víðka vinnumøguleikar
- Arbeiða fyri handilsavtalu við ES og fleiri altjóða handilsavtalum
- Menna vinnuferðavinnu
- Leggja saman føroyskar sendistovur
- Broyta skattareglur fyri arbeiðsfólk uttanlands
- Løggilda handverkarar

## UMHVØRVI OG ORKUSKIFTI

- Seta realistisk mál og kveikja kapping innan grøna orku-framleiðslu
- Nýta avlopsorku betur og tryggja kunngerð um endurnýtslu av burturkasti
- Skunda undir at loyva nýggjum aktørum á marknaðin
- Kanna alternativar orkukeldur so sum kjarnorku



# TRIVNAÐUR

Sambandsflokkurin er ein sosialliberalur flokkur, sum sameinir frælsar vinnukarmar við sterka vælferð. Vit vilja byggja eitt samfelag við sterkum búskapi og tryggum familjukorum.

Bústaðarmarknaðurin er ein av størstu avbjóðingunum í Føroyum. Tí skal tað gerast lættari hjá familjum, ungum og lesandi at fáa ein bústað.

Familjan er grundarlagið undir einum sterkum samfelagi. Betri fíggjarligar umstøður hjá barnafamiljum og trygg kor í barsilstíð og barnaárum eru tí ein sjálvsøgd raðfesting.

Eitt sterkt heilsuverk er ein fortreyt fyri trivnaði. Allir føroyingar skulu vera tryggjaðir ta hjálp og viðgerð, teimum tørvar. Arbeiðskorini á heilsu- og røktarøkinum skulu tí vera so góð, at starvsfólk velja økið – og vilja vera verandi.

Mentan, vitan og útbúgving eru lykilin til framtíðina. Frá fólkaskúlanum til hægri útbúgving og gransking skulu Føroyar byggja sterkar førleikar.

Føroyskur ítróttur og list eru á altjóða stigi, og skulu tí eisini hava umstøður hareftir.



# OKKARA MÁL

## BÚSTAÐIR

- Stovna bústaðargrunn á 200 milliónir krónur, har nýggir keyparar kunnu læna upp til 5% og í mesta lagi 200.000 kr til eginfígging
- Loyva 50% av mánaðarliga pensjóns-inngjaldinum sum løn í upp til 10 ár
- Gera treytir og byggireglur einfaldari
- Tryggja ein kappingarføran leigumarknað við øktum útboði
- Seta ferð á matrikulering fyri at fáa fleiri grundstykki
- Bústaðir skal einans byggja alment gagnligar bústaðir so sum lestraríbúðir og eldrabýli

## FAMILJAN

- Hækka barnafrádráttin við 2.000 kr. fyri hvørt barn
- Hækka hámarkið á barsilsútgjaldinum til 60.000 kr. um mánaðin
- Stovna skattafría íløgusparikonto til føroyska borgaran

## HEILSUVERKIÐ

- Árligan skattafrádrátt á 25.000 kr til starvsfólk í heilsu- og røktarøkinum
- Seta rehabiliteringsdepil á stovn
- Gera heildarætlan við heilsufakfólkum fyri førleikamenning og víðari útbúgving
- Viðgerðartrygd og viðgerð eftir útgreining
- Stytta bíðitíðir fyri kropsligar og sálarligar avbjóðingar
- Raðfesta upplýsing og viðgerð av kvinnusjúkum
- Barna- og Ungdóms Psykiatriin skal raðfestast

## MENTAN OG ÚTBÚGVING

- Seta forboð móti skíggjanýtslu í skúlunum
- Avtaka vetrarferiuna og geva læraranum fleiri tímar til næmingin
- Styrkja tvílæraraskipan og halda floksmarkið á 22 næmingar
- Fígging til eyka uppgávur
- Gera eina heldarætlan fyri hægri útbúgvingar í Føroyum
- Handaligu útbúgvingar raðfestast, og gerast minni bókligar



# TRYGGLEIKI

Heimurin er vorðin meira ótryggur, og geopolitiskur spenningur hevur økt týdningin av Føroyum í Norðuratlantshavinum.

Í slíkum tíðum er týdningarmikið at hava sterk samstarvsbond. Sambandsflokkurin vil tí varðveita tryggleikan í ríkisfelagsskapin og luttaka í verandi verjuavtalum.

Tryggleiki snýr seg eisini um eitt samfelag við greiðum reglum og sterkari rættartrygd. Útlendsk arbeiðsmegi hevur stóran týdning fyri føroyska búskapin, men tilflyting krevur eisini greiðar reglur og góða integratión.



# OKKARA MÁL

## TRYGD OG TILFLYTING

- Einans loyva familjusamanføring eftir 3-ára búseting
- Krevja reina revsiváttan frá teimum, sum arbeiða og flyta til Føroya
- Krav um próvtøkur í føroyskum máli og mentan fyri varandi búseting
- Útlendingar, sum fremja lógarbrot, skulu vísast av landinum
- Útlendsk arbeiðsmegi skal arbeiða í minsta lagi 30 tímar um vikuna, fyri at føroyingar altíð standa fremst í røðini
- Herða revsilógina og eftirlitið við landamørkini fyri at fyribyrgja rúsevnum og kriminaliteti
- Seta skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk at kanna, hvussu vit fyribyrgja øktum kriminaliteti í Føroyum – og seta ítøkilig átøk í verk. Ein sokallaðan bandapakka

# SAMBANDSFLOKKURIN Á FÓLKATINGI

Føroyar skulu hava størri rásarúm og greiðari rødd í uttanríkis-, trygdar- og verjumálum.

Samstundis skal rættarøkið styrkjast, so at politiið, rætturin og kriminalforsorgin hava karmar á sama stigi sum í Danmark. Færri markaforðingar og betri handilssambond skapa nýggjar møguleikar hjá føroysku vinnuni. Við ábyrgd, tryggleika og menning standa Føroyar seg best í einum sterkum felagsskapi.

## OKKARA MÁL

- Nútímansgera ríkisfelagsskapin við útspælinum "Nýtt Samband"
- Vit vilja gera eina sjálvsstýrislóg, víðka um uttanríkispolitisku heimildirnar og staðfesta føroyska avgerðarrættin
- Stuðla føroyskari gransking
- Gagnnýta stórrakstrarfyrimunir, sum tryggja heilsuverkið, gransking, útbúgving og fígging til Suðuroyartunnilin
- Framhaldandi raðfesta filmspuljur sum NORDDOK
- Framhaldandi raðfesta upplýsandi tiltøk móti fordómum sum SJÓMAQ
- Vit vilja fíggja fleiri størri verkætlanir til gagns fyri ríkisfelagsskapin og allar føroyingar



# FÓLKATINGSAVRIK 2022-26

### Rættarmál

- 5,8 mió. kr. til ein innandura skjótibana
- 3 mió. kr. til ein dátugreinara hjá Føroya Politi
- 2 mió. kr. til kunningarfólk hjá Føroya Politi
- 1 mió. kr. til umvæling av hølum hjá Føroya Politi
- 10,4 mió kr til nýggjar ákærar
- 2 mió. kr til ein politbát
- 22,6 mió. kr. til KT-kervið hjá Føroya Politi
- 19,5 mió. kr. til fýra ársverk innan kanningararbeiði og fyribyrging
- 400 t.kr. til videoútgerð til Føroya Rætt
- Nýggj KT-skipan til Føroya Rætt
- Fótleinkjuskipanin sett í verk

### Gransking og mentan

- 41 mió. kr til havgransking
- 15 mió. kr. til gransking í uttanríkis-, trygdar- og verjugransking
- 32,5 mió. kr. til Sjómaq
- 3,8 mió. kr. til uppraðfesting av stuðuli til háskúlauppihald í ríkisfelagsskapinum
- 30. mió kr til NORDDOK
- 16 mió kr. til undirvísingartilfar um ríkisfelagsskapin
- 2 mió. kr til umvæling av sluppini Jóhannu
- 1,9 mió. kr til Rescue Lív

### Ríkisfelagsskapsmál

- Fastan sess í formansskapinum í Norðurlandaráðnum
- Sett statslán til Suðuroyartunnilin á breddan
- Talgilt koyrikort góðkent í Danmark
- Ríkisfelagsskapsvika í danska fólkaskúlanum
- Javnsetan av føroyingum í Danmark í samband við plejeorlov
- Møguleikan hjá Føroyum at knýta seg uppí ætlaða sjókaðalin millum Grønland og Danmark

Les øll avrikini á saft.fo



EITT LIÐ **EIN FLOKKUR**